# Væleydnað summarferð t



*Uppi við altarið í Fámjins kirkju. Fremst stendur Jákup Michael Mikkelsen*



*Torbjørn Lisberg greiðir frá í kirkjuni í Fámjin*

**HUGLEIÐING**
*Tummas Lenvig*

Sum fyrr hevur verið nevnt í bløðunum, funnust nakrir av teimum monnum, sum í 1941 vóru við at gera flogvøllin í Reykjavík, saman í apríl í ár á Hotel Hafnia í Havn. Nú vóru 64 ár liðin. Av teimum hálvtriðjahundrað monnunum, sum við høvdu verið, hittust nú 14 aftur. Hetta vóru tó ikki allir, sum eru á lívi, nakrir settu sær ikki føri at luttaka. Fyrireikararnir at fáa hesa stevnu í lag vóru Thorbjørn Lisberg í Trongisvági saman við Jákup Michaeli Mikkelsen á Toftum.

Henda samkoming var frálíkt tiltak. Mangt minnið kom fram aftur og havt á orði um krígstíðina, um tilburðir á sjógvi og landi, tó mest um ferðina til Íslands og um arbeiðið og umstøðurnar har. Eisini varð tikið til máls um, hvussu hættislig í grundini henda ferð hevði verið millum londini við so nógvum fólki ísenn í ringastu vanda- og skaðatíðini her um vegir tá.

Eftir hugnaliga samveru og gott borðlag tók Thorbjørn orðið og segði nøkur samhugað og viðkomandi orð og endaði við uppskoti um at gera eina summarferð í felag saman til Suðuroyar í sambandi við, at hin nýggi Smyril eftir ætlan skuldi setast í sigling í summar. Sjálvur er Thorbjørn royndur formaður og ferðaleiðari hjá pensionistum. Hann beyð sær til at leggja ferðina til rættis og at skipa fyri. Hetta var gott tilboð.

Tíverri kom nýggi Smyril ikki til tíðina, sum øll høvdu vónað, men fyrireikararnir hildu nú, at væl bar saktans til kortini at gera hesa ferð við verandi skipi og at koma suður fyri ólavsøku. Avrátt varð at koma 21. juli og at liggja nátt á ferðamannaheiminum í Øravík. Hetta kom í lag, tó nú komu ikki allir við,tá ið saman um kom. Men fýra aðrir komu við nú, sum ikki vóru við fyrr, tríggir úr Suðuroy og ein úr Miðvági. Umframt var kona ein luttakara eisini við.

Um hesa ferð kann sigast, at hon eydnaðist stak væl á allan hátt. Dagurin 21. juli gjørdist hin fagrasti av øllum, ið verið hevur á sumrinum



*Nakrir av teimum, sum í 1941 vóru við at gera flogvøllin í Reyjkjavík hittust í apríl á Hotel Hafnia í Havn 64 ár eftir. Av teimum hálvtriðjahundrað, sum við høvdu verið, hittust nú 14 aftur*